# Ramsar arbeiðið, sum varð gjørt í Skúvoynni í 2020

Bergur Olsen og Jóhannis Danielsen 23.02.2021

**Endamál.** Endamálið við kanningunum á Skúvoynni er at fáa langar tíðarseriur, og tí verða somu teljingar í flestu førum endurtiknar á hvørjum ári. Í summum førum, har tað tekur langa tíð at telja, ganga tó fleiri ár ímillum teljingarnar.

## Byrgisbakki

### Lundar

Ein telda við 16 vevmyndatólum stóð í Byrgisbakka alt summarið. Vevmyndir vórðu tyknar inni í 14 lundareiðrum alt samdøgurið, frá ti at lundarnir byrjaðu at reiðrast, til teir fóru av stað aftur; frá hálvum mai til mitt í september. Eitt vevmyndatól stóð uttanfyri og tók myndir av lundalandinum alt summarið. Útgerðin varð eftirhugd o.u. 14. hvønn dag, og linsurnar vórðu vaskaðar. Tá ið pisurnar eru komnar út, dálkast linsurnar skjótt, so ætlanin var at fáa onkran skúvoying at reinsa linsurnar fyri tímaløn, men hetta bar tó ikki til, tí har eru so fá fólk.

Upptøkurnar vórðu stroymdar á heimasíðuni hjá Havstovuni, frá tí at pisurnar komu út, til tær vórðu floygdar. Allar pisurnar komu undan.

## Høvdin

### Sjálvvirkandi fototól

Tvey fototól tóku 1 mynd/tíma av tveimum økjum í Høvdanum frá tí at lomvigin og ritan byrjaðu at verpa, seinast í mai, til ungarnir vórðu floygdir, umleið 10. august.

I 2020 vóry trý lívfrøðilesandi sett í avmarkaða tíð, at telja lomviga og ritu á myndunum tiknar í 2019 og 2020. Hetta arbeiði var gjørt fyri at kanna um tað er nakað sveiggj í hvussu nógvur fuglur er til staðar í løpi av degnum (Mynd 1-2 og talva 1).




Mynd 1. Døgnvariatión í hvussu nógvur lomvigi situr í avmyndaða partinum av Høvdanum.

Sum sæst á mynd 1 var ein týðulig variatión í hvussu nógvur fuglur er til staðar í berginum, alt eftir tíð á døgninum. Hetta hevur stóran týdning at vita, tá teljingar frá ymsum árum skullu samanberast, fyri at siga nakað um gongdina í stovninum. Tað áhugaverda er at talið av lomviga sveiggjar eins í juni 2019 og 2020. Um hetta er vanliga sveiggji ár eftir ár, eru tølini um stovns gongd, nógv meira eftirfarandi. Víðari sæst eisini hvørja tíð á døgninum, best er at gera teljingar fyri at fáa góð tøl fyri stovnsstøddina.

Talva 1. Miðaltalið av bølandi og “ikki bølandi” ritu, og lomviga í avmyndaða partinum av Høvdanum í juni 2019 og juni 2020.

| Ár | Rita bølandi | Rita, ikki bølandi | Rita Samlað | Lomvigi |
|---|---|---|---|---|
| 14-19 Juni 2019 | 79 | 51 | 125 | 269 |
| 14-17 Juni 2020 | 101 | 55 | 156 | 263 |

Sum sæst í talvu 1 var nøgdin av ritu og lomviga nakað tað sama í 2019 og 2020, tó so at tað var væl meira av reiðrandi ritu í 2020, ið er tekin um at umstøðurnar vóru betur tá.

Av tí at talið av bølandi ritu er umleið tað sama í løpi av degnum, verður eisini hugt eftir hvussu talið av tí fuglinum, ið ikki bølir, sveiggjar (Mynd 2). Hetta kann siga nakað um hvørja tíð av degnum ritan leitar sær føði, og hvussu stóran part av degnum hon er vekk. Sum sæst á mynd 2, líkist gongdin í sveiggjinum nógv frá kl 00:00 til uml. kl 10:00. Men eftir tað sæst at minni av fugli er til staðar restina av degnum í 2019, enn í 2020. Hetta kundi verði tekin um at fuglurin nýtti størri part av tíðini at leita sær føði í 2019, enn 2020. Hetta er eisini í trá við talvu 1 ið vísir at tað vóru færri reiðrandi ritur í 2019 enn í 2020.




Mynd 2. Talið av ritu í avmyndaða partinum av Høvdanum í juni 2019 og 2020, sum ikki reiðraðist.

Víðari er týdningarmikið at vita hvussu talið av reiðrandi og ikki-reiðrandi fugli sveiggjar frá ár til ár, við tað at størri partur av fuglinum reiðrast, um umstøðurnar eru góðar. Tað

vil siga at talið av reiðrandi, í mun til ikki-reiðrandi, fugli sigur nakað um t.d. umstøðirnar úti á havið viðv. føði eitt ávíst ár.

**Teljing av fugli eftir myndum**
Lomvigin í Høvdanum hevur verið taldur á hvørjum ári síðani 1972, undantikið í 1975. Fram til 2017 varð fuglurin taldur beinleiðis við kikara, sum økti 25 ferðir. Síðani tá hevur fuglurin verið taldur á digitalum myndum í høgari góðsku. Síðani 2001 er eisini ritan og havhesturin taldur og skrásett verður, hvussu nógvir ungar koma undan. Fyri at kunna skráseta, hvussu nógvir ungar koma undan, er neyðugt at telja tríggjar ferðir. Høvdin varð tí avmyndaður tríggjar ferðir.

**Fotomyndirnar av Høvdanum at telja lomviga, ritu og havhest eftir vórðu tiknar**
15. juni: 50 myndir til at telja lomviga, ritu og havhest eftir.
25. juli: 50 myndir til at telja ritungar eftir.
15. augst: 50 myndir til at telja havhestaungar eftir.

## Heiðafuglur

Heiðafuglurin í allari oynni varð taldur í juni og juli. Meinhard Hentze (yngri) taldi heiðafuglin fyri tímaløn. Hetta tók. 6 dagar. Sera lítið av heiðafugli hevur verið seinastu árini. Niðan fyri er vist samlaða talið á pørum av teimum vanligastu fuglunum, sum hava reiðrast á Skúvoynni fýra tey seinastu árini. Økið, har tey einstøku pørini reiðraðust, er skrásett á kort í støddini 1:20.000.

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|
| Skúgvur | 117 | 91 | 62 | 65 |
| Kjógvi | 28 | 18 | 6 | 3 |
| Tjaldur | 33 | 15 | 11 | 3 |
| Spógvi | 32 | 13 | 2 | 2 |
| Mýrisnípa | 12 | 9 | 6 | 3 |
| Lógv | 22 | 8 | 4 | 5 |
| Steinstólpa | 54 | 11 | 2 | 0 |
| "Títlingur" | 131 | 33 | 7 | 16 |

# Ljósloggarar

Í samstarvi við Norsk Polarinstitut vórðu ljósloggarar settir á 30 lundar og 22 ritur fyri at kanna, hvar teir halda til um veturin. Fyri at kunna lesa úrslitini úr loggarunum, mugu fuglarnir fangast aftur árið eftir at loggararnir eru settir á ella seinni, og tí tóku vit eisini gamlar loggarar av lundum og ritum. Av tí at torført er at koma til ritur í Skúvoynni, verða loggararnir settir á ritur í Stóru Dímun.

# Lírar

Magar og garnar frá 50 lírum, sum vórðu veiddir, vórðu savnaðir.